# Kanning um happing í føroyska fólkaskúlanum 2014/2015

Mentamálaráðið 15. november 2014

# Endamálið við kanningini

- at kanna í hvønn mun happing er í fólkaskúlanum
- at kanna, hvørji  happingarmynstur eru galdandi
- at fáa dagførda vitan sum grundarlag undir at endurskoða trivnaðarætlanir í skúlunum
- at skipa fyri menningarátøkum
- at minka um happing
- at økja um trivnað og læring hjá næmingunum
- at kanna úrslit av átøkum, ið eru sett í verk, til tess at minka um happingina
- at kanna okkara egnu viðurskifti fyri at hava haldgott grundarlag at gera ábøtur

# Grundarlagið undir kanningini

- Kanningin í 2007 í 5., 7. og 9. fl. umleið 2200 næmingar luttóku
- Dagføringar m.a. viðvíkjandi sosialum miðlum
- Nýggj vitan um gransking innan happing

# Hesi standa fyri kanningini

- Mentamálaráðið skipar fyri kanningini

- Fróðskaparsetur Føroya/Granskingardepilin ger kanningina

- Fylgibólkur, ið er mannaður við umboðum frá :
  - Mentamálaráðnum
  - Føroya Lærarafelag
  - Felagnum heim og skúla
  - Skúlaleiðarafelagnum

# Skipan

- Kanningin fer fram 11. – 28. nov. 2014
- Næmingar í 5., 7. og 9. fl. luttaka
- Lesandi á  námsvísindadeildini skipa fyri spurnarblaðskanningini í skúlunum
- 40 spurningar
- Næmingar, ið hava tørv á hjálp t.d. at lesa, fáa stuðul
- Kanningin er navnleys (anonym)
- Dátueftirlitið hevur góðkent kanningina
- Kanningin varir í mesta lagi ein pultstíma

# Tíðarætlan

| | |
|---|---|
| • Kanningin verður gjørd | 10. – 28. nov. |
| • Innlesa spurnarbløð | 28. nov. – 7. jan. |
| • Tilfarið tøkt at viðgera | 10. jan. |
| • 1. viðgerð | 15. feb. |
| • 2. viðgerð | 15. mars |
| • Frágreiðing til viðmerkingar | 13. apríl |
| • Handa frágreiðing | 28. apríl 2015 |
| • Ráðstevna um trivnað | Mai 2015 |
| • Átøk setast í verk | Skúlaárið 15/16 |

# Kanningin í 2007

- Happingarmynstrið líkist tí í okkara grannalondum
- Dreingir vóru í størri mun partur av happingini
- Happingin minkaði við aldrinum
- Ikki eyðsýndur munur millum stórar og smáar flokkar/skúlar
- 11% kendu seg happað
- Happing og trivnaður hanga saman

# Átøk, sum eru sett í verk

- Skipað fyri førleikamenning fyri lærarum og leiðarum, at fyribyrgja og basa happing og skapa trivnað
  - skeið fyri lærarum, sum høvdu trivnað sum serligt ábyrdarøki í skúlunum
  - styttri skeið fyri øllum lærarunum í fleiri skúlum
  - allir skúlar nýttu tilfarið hjá Helle Høiby, “Ikki mere mobning” og “Klassemødet” sum amboð. Seinni eisini “Drop drilleri”

# Átøk, sum eru sett í verk

Skúlarnir fingu við hesum nøkur amboð í arbeiðinum at fyribyrgja happing og at veita hjálp í happingarmálum

Happing var øki, sum skúlarnir í størri mun viðgjørdu og arbeiddu við sum part av undirvísingini

Dugdu betur at varnast happing, fyribyrgja og seta inn

# Átøk, sum eru sett í verk

- Fokus á trivnað og virðisgrundarlag í skúlunum
  - skeið um at skapa, orða og arbeiða við virðisgrundarlagnum hjá skúlanum
  - kunning/skeið í skúlunum um trivnaðarbeiði
  - skúlarnir gjørdu trivnaðarætlan
  - skipaðu trivnarbólkar

# Átøk, sum eru sett í verk

- Floksins tími í byrjanarundirvísingini
- AKT lærarar eru settir í skúlunum
- Førleikastovur eru skipaðar seinastu tvey skúlaárini
- SSP-skipan er sett í verk, har trivnaður er eitt stórt øki.